Tórshavn – Juli 2024

# VÆLKOMIN Á NÁTTÚRUVÍSINDADEILDINA (NVD) Á FRÓÐSKAPARSETRINUM

Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við, at tú ert tikin upp til bachelorútbúgving í lívfrøði á Setrinum. Vit vænta og vóna, at tú fært nøkur góð, lærurík, kveikjandi og mennandi ár á Setrinum.

**Innleiðsla**
Felags innleiðsla fyri tey nýggju lesandi á øllum Setrinum verður :

**Mánadag 19. august 2024 kl. 9.00-11.00**
**í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestrarabryggja 15)**

Eftir tiltakið í høllini verður tú boðin til serstakt tiltak fyri lesandi á Náttúruvísindadeildini, sum húsast í sama bygningi. *Sí vinaliga hjáløgdu skrá fyri innleiðsluvikuna á Náttúruvísindadeildini.*

**Kunning:**

**Skeið og lærubøkur**

Hjálagt er:
- Lestrarleiðir
- Bókmentalisti
- Kunning/tilboð um innleiðsluskeið í støddfrøði

*Gev gætur!* Fyri at koma so skjótt og gott í gongd sum gjørligt er týdningarmikið, at tú hevur neyðugu lærubøkurnar tøkar frá byrjan av lestrarárinum (sí hjálagda yvirlit). Tey lesandi bíleggja sjálv sínar lærubøkur. Vit mæla til, at tú gert hetta í góðari tíð, tí í onkrum føri kann tað taka nakað av tíð at fáa bøkurnar til Føroya.

Vælkomin til eina spennandi útbúgving á Náttúruvísindadeildini. Vit gleða okkum til at síggja teg.

Vinarlig heilsan

***Náttúruvísindadeildin***
Jónrit Halling, útbúgvingarleiðari fyri lívfrøði
T-postur: jonrith@setur.fo
Fartlf. 292554

# Skrá fyri innleiðsluna á Náttúruvísindadeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| kl. 09.00 | Skráseting (lesandi fáa lestrarkort og kunningarmappu) |
| kl. 09.15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| kl. 09.25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| kl. 09.30 | Tónleikur |
| kl. 09.45 | Røða |
| kl. 10.00 | Básar á Svalanum |

*Lesandi fara út á deildirnar.*

| | |
|---|---|
| kl. 11.10 | Dekanur bjóðar vælkomin |
| kl. 11.20 | Lestrarráðsforfólkið, kunnar um Lestrarráðið |
| kl. 11.30 | Lestrarvegleiðarin, Kirstin S. Rasmussen, kunnar um lestrarvegleiðingina |
| kl. 11.40 | Myndatøka |
| kl. 11.50 | Ábit |
| kl. 12.40 | Starvsfólk og nýggj lesandi presentera seg fyri hvørjum øðrum og greitt verður frá lestrinum |
| kl. 13.00 | Rundvísing í Sjóvinnuhúsinum |
| kl. 13.40 | Liðugt |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

Seinnapart verður innleiðsla í fyrsta skeiðnum, sum verður á skrá í heyst. Tit møta á **Náttúruvísindadeildini (høli U209), Sjóvinnuhúsið.** Skráin fyri hesar dagarnar er hendan:

| | |
|---|---|
| kl. 11.00 – 12.00 | Ábit |
| kl. 12.00 – 14.45 | Innleiðsla til skeiðið "Almenn lívfrøði" |

**Mikudagin 21. august**

Hendan dagin møta tit kl 9:00 og eru saman við tykkara árgangi. Mentorar skipa fyri samansjóðandi tiltøkum, síðan verður felagsmáltíð og undirhald.

**Hósdagin 22. august**

Innleiðsla í tveimum skeiðum, sum verða á skrá í heyst. Tit møta á **Náttúruvísindadeildini (høli U209), Sjóvinnuhúsið.**

| | |
|---|---|
| kl. 9.00-11.45 | Innleiðsla til skeiðið “Plantur og djór í Føroyum” |
| kl. 11.45-12.15 | Ábit |
| kl. 12.15- 15.00 | Innleiðsla til skeiði “Stødd- og hagfrøði fyri lívfrøðingar” |

**Fríggjadagin 23. august á Námsvísindadeildini**

| | |
|---|---|
| kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |

Síðan verður innleiðsla í einum skeiði, sum verður á skrá í heyst. Tit møta á **Náttúruvísindadeildini (høli U209), Sjóvinnuhúsið.**

| | |
|---|---|
| kl. 12.30-13.00 | Ábit |
| kl. 13.00-15.00 | Innleiðsla til skeiði “Fróðskaparhegni, vísindaástøði og etikkur” |
| kl. 20.00-02:00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |